Nú fekk hj. aftur hevnd

Tað er syrgiligt, at ítróttarskrivarar (um ein kann kalla teir — hann so) AFTUR leypa á har garðurin er lægstur.

Undir ábyrgd!!

Royndirnar vísa, at tað er sera trupult at fáa fatur á dómaraseðlinum, tá ein dystur skal byrja.

Dómarin má renna frá »peri til pól« fyri at fáa fatur á dómaraseðlinum.

Og so ikki fyri at tala at fáa fatur á liðformonnunum at skriva undir dómaraseðilin.

Skrivað stendur: Grein 27, stk. 4: »Dómaraseðilin verður fyltur út undir ábyrgd av liðformanninum og dómara.

Liðformaðurin skrivar undir við ÁBYRGD, meðan dómarin er hjá.«

Um dómarin roynir at hondheva hesa reglugerð, ja, so verður hann kallaður bæði eitt og annað av venjarum, spælarum o.s.fr.

Heilag kúgv!!

Tað skuldi ikki verið so trupult at funnið fram til hann, sum hevði ábyrgdina av mistakinum hjá MB. Tað er bara at lesa dómaraseðilin í Tingakrossi, so sæst hvør liðskipari er!!!

Men hann er kanska ein heilag kúgv, so hann kann ein ikki lasta fyri hetta mistak!!!

PUMA®
Kyndil - VÍF
B71 - HB - B68
B36 - Fram
og mong onnur
spæla í PUMA
Ítróttarhandilin
Hoydalsvegur 2, Tlf. 12753

Flogfrakt/kurerpost
Taxa/charterflúgving
Kring allan knøttin
Faroe Airways Transport
Main office: Yvri við Strond 6 • FR-100 Tórshavn • Faroe Islands • Phone: +298 17377 • Fax: 19377
Denmark: Tømmerup Stationsvej 10 • DK 2770 Kastrup • Phone: 32527080 • Fax: 32527167

Kundu ikki havt sagt frá

Tað er ikki dómarans uppgáva, at vita hvør mannar liðini, sum skulu dystast móti hvør øðrum.

Hevur venjarin sett ein av føstu leikarunum av, er hann skaddur, hevur karantenu, ja, tað er ikki lætt hjá dómaranum at vita!!

Av hesi einføldu orsøk kundi dómaratrioin ikki siga frá, at ein maður manglaði á dómaraseðlinum.

Okkurt annað liggur undir

Tað man liggja okkurt annað undir teimum ákærum, MB kemur við. Møguliga vilja teir vaska sínar hendur, eins og Pontius Pilatus, fyri síðan at KROSS-festa dómaratrio HB 1.

Løgið, tí áðrenn dystin vóru øll so glað, at dómaratrioin var nevnd HB 1.

MEN — MB kann ikki *renna undan ábyrgdini* viðvíkjandi mistaki teirra.


Hevndin hjá Hilmar Jan

Hilmar Jan hevur øll tey ár, hann hevur skrivað (?) ítrótt lagt eftir dómaranum. Vit dómarar eru nokkso tolnir og hava valt ikki at taka okkum tikni av tí, Hilmar Jan hevur skrivað, men nú heldur dómaratrio HB 1 at tað er nóg mikið.

Hr. Hilmar Jan Hansen, eitt lítið vet av sannleika má vera í tí, tygum skriva. Ja, eitt lítið vet av sannleika!!!

Tøkk til MB — hóast alt

Dómaratrio HB 1 er altíð sera væl móttikin av MB, so tað er spell, um hetta skal fara aftur í »ommu« sína.


og SJÓVINNUBANKIN
samarbeiði fyri betri fótbolti

Dystur nr.: 2826

DÓMARASEÐIL

Deild: 1 deild

Heimalið: M B

Útilið: 97

Heimalið Nr.	Navn á leikara	gult kort	rødt kort
1.	Arni Nolsøe		
2.	Jónas Rasmussen		
3.			
4.	Kjartan Arnbjørn		
5.	Vilhjálmur Vilhjálmsson		
6.	Eyðun Mortensen		
7.	Egon Jacobsen		
8.	Tórbjørn Jónsson		
9.	Petur Knudsen		
10.	Jóhannes M. Hansen		
11.	Jens P. Hansen		
14.	Jónfinnur Thomasen		
15.	Símun á Vatnsá		

Útilið Nr.	Navn á leikara	gult kort	rødt kort
1.	Carl Whitehouse		
2.	Odvi Justinussen		
3.	Poul Schack Hansen		
4.	Jon Egil [illegible]		
5.	Pitak Duna Dalsø		
6.	Allan Samuelsen		
7.	Anton Ellendal		
8.	Poul Samuelsen		
9.	Jónus H. Justinussen		
10.	Per Dalhaven		
11.	Jón Pétur Olsen		
14.	Eilvard Tórsfoss		
15.	Óli Rúni Jónsson		

Liðskipan: M Schaap Danielsen

Liðskipan: Hilmar Skaale

Dagur: 27.5.90

MÁLÚRSLIT 2 - 0 (Heimalið - Útilið)

Dómari

Línuvørður

Línuvørður

»Orgasma«

Men — vil ítróttarpressan, saman við nøkrum fanatiskum MB'arum skapa illvilja millum HB og MB, ja, so er hetta tann rætti vegurin.

Og tá er ikki at steðga her, men ikki helma í áður enn øll, sum hava við ítrótt at gera, eru farin at KLANDRAST.

Tá má Hilmar Jan Hansen hava fingið »orgasmu« so tað forslær!

Dómaratrio HB 1



LIÐMYNDIN
MB 1. deild

Mc° BRAYE
RESTAURANT
Kongagøta 10 Tórshavn
Tlf. 19767

interRent
Bilútleigan — rent a car
Nýggir VW-leigubilar uttan førara
Norrøna bilar tlf. 15354

Sama hvar á knøttinum tú ætlar tær

Flogfelag Føroya
útvegar ferðaseðilin